Foreldrafundur 10.09.24.

Pálin Olsen, lesivegleiðari, hevði fyrilestur um lesiførleika. Hon hevði millum annað hesi ráð til at menna góðan lesiførleika: Les alskyns tektstir, endurtikna lesing við stuðli og hjálp umframt nógva lesitíð.
Lesingin verður ikki automatiserað, fyrr enn barnið til dømis hevur sæð og lisið sama orð upp til 25 ferðir í ymiskum samanhangum.

Tá tit skulu lesa saman við barninum:
Ádrenn lesingina:
Eru myndir – so tosa um myndirnar, og tosið um hvat teksturin man fara at snúgva seg um. Tá gerst tað mangan lættari at lesa tekstin.
Ímeðan tit lesa:
Les tekstin saman við barninum. Lat barnið lesa - hjálpið tá ið á stendur.
Tá tit hava lisið:
Tosið um tað sum er lisið. Hvat var hann um? Skilti barnið tekstin?

Í ár fara vit at skifta millum tvær ymiskar lesibøkur við hóskandi skrivligum uppgávum. Afturat hesum fara næmingarnir at fáa sjálvvaldar frílesibøkur. Vit leggja eisini dentin á at skriva nógv - bæði fyrisagnir og at venja handskrift.
Vit eru farin í holt við at læra okkum at arbeiða við teldu. Tað er at rita inn á Office, hyggja inn á heimasetningin, ibok og sprotin.fo.

Næmingarnir eru enn sera arbeiðssamir, sum er sera gott. Tað er ymiskt á hvørjum støði teir eru á.  Hetta er púra vanligt. Tað er upp til foreldrini at meta um, hvussu langt lesibrotið skal vera, tá ið skúlating skulu gerast. Týdningarmikið er at lesa sama brot tríggjar ferðir innan 12 minuttirnar.

Útiskúli er áleið 6.hvørja viku. Boð verða skrivað á heimasetningin. Týdningarmikið er, at næmingarnir eru ílatin hóskandi veðrinum.

Síðan vit byrjaðu aftaná summarsteðgin hava tað verið fleiri tvístøður enn vanligt. Vit arbeiða og práta nógv um at vera góðir vinir og at rúma hvørjum øðrum. Vit brúka tilfarið "Betri vinir", sum er at fyribyrgja happing og útihýsan. Millum annað eru ymisk samansjóðandi spøl og massagusøgur til at taka.
Gott hevði verið um tit tosaðu um týdningin av teimum fýra grundvirðunum í "Betri vinir". Hesi eru: Virðing, tolsemi, umsorgan og dirvi.

Ein góður skúladagur:
Ynskiligt er, at lærarar og næmingar møta rættstundis, mett, væl uppløgd og til reiðar til undirvísing.

Minnist til:
Næmingar hava dunk við, dagførið pennahúsið um neyðugt, merkið alt sum merkjast kann klæðir, skógvar, taskur, blýantar og alt sum hartil hoyrir. So kemur tað lættari aftur

til rætta eigara.

Telefonpolitikkur skúlans:
Ongar telefonur, ur ella líknandi í skúlatíð. Um neyðugt skulu hesi liggja sløkt í taskuni. Telefonirnar kunnu nýtast uttanfyri skúlans øki.

Flokskonto:
150 kr. pr.mdr. ella 300 kr. pr.ár. Pengarnir verða brúktir til at keypa heftir, mappur, límstiftir, útferðir og hugna.
Konto nr: 6460-5870404

Foreldraráð:

Ninni, Jógvan og Oyvør.